Mentamálaráðið

# Løgfrøðingur/Fulltrúi

***Starvið:***
Eitt áhugavert og fjøllbroytt starv sum fulltrúi er leyst at søkja í aðalskrivstovuni.

Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a.:

- Lógarfyrireikandi arbeiði, kunngerðir og reglugerðir innan málsøkið
- Løgfrøðilig ráðgeving og vegleiðing til starvsfólk, stovnar og borgarar
- Vegleiðing og kunning um nýggjar lógir o.a.
- Umsiting av málsøkjum, sum verða løgd til tín
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð
- Aðrar uppgávur

***Førleikakrøv***
Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur løgfrøðiligt embætisprógv.

Tað er ein fyrimunur, at tú hevur royndir úr øðrum starvi. Harumframt skalt tú bæði kunna arbeiða sjálvstøðugt og samstarva í arbeiðsbólkum o.ø.

***Vit bjóða:***
- Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir
- Samstarv við royndar løgfrøðingar
- Sjálvstøðugt starv
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan.

***Setanar- og lønartreytir***
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um ráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

***Umsókn***
Umsókn við prógvum o.ø skulu sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. august 2002. Starvið verður at seta skjótast tilber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum, á tlf. 35 50 50.

*__Mentamálaráðið__ hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
*Í __aðalskrivstovuni__ eru stápsfunktiónir innan m.a. løgfrøði, búskap, kunningartøkni og fyrisiting. Fyriskipanin er býtt í 3 deildir - fólkaskúladeild, vinnu-/miðnámsskúladeild og mentamáladeild - sum stápsfunktiónirnar veita ráðgeving til, umframt til aðalstjóran og landsstýrismannin.*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3394
Navn: Sp/f Petur L. Hansen
Adressa: Guttormsgøta 5, 188 Hoyvík

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 25.06.2002
Viðtøkudato: 25.06.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Petur L. Hansen, Guttormsgøta 5, 188 Hoyvík.
Stjórn: Petur L. Hansen, Guttormsgøta 5, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Revisión v/ Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka verkstaðsarbeiði-handverk og annað virksemi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 14. august 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2903, Sp/f Hansoft, 530 Fuglafjørður.

Viðtøkur broyttar: 25.06.2002.
Kapitalur: Hækking við kr. 80.000,00 til kr. 160.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 625
Stjórn:
Innkomin sum stjóri: Palli Ziskason, á Brekku 53, 700 Klaksvík.

Skráseting Føroya tann 15. august 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1478, P/F E. Pihl & Søn, Føroyar, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 24.06.2002.
Nýtt hjánavn: P/F PIHL FØROYAR (P/F E. Pihl & Søn, Føroyar)
Roknskapárar broytt: 01.01.-31.12.
Umleggingarár: 30.06.2002-31.12.2002.

Skráseting Føroya tann 15. august 2002

Kristin Balle


Plátusmiðjur

Til nýbygda verkstað okkara sóknast vit eftir plátusmiði at byrja skjótast gjørligt

Vit hava nógv at gera og vænta tískil at tú ert álitandi og at tú ert ágrýtin og dugir at arbeiða sjálvstøðugt

Løn verður eftir nærri avtalu. Nærri fæst at vita við at venda sær til
Hans Jacob Kollsker, tlf. 211013

BILVERKSTAÐIÐ
v/ H. J. Kollsker
Tlf. 311013 og 211013
á Hjalla · Box 3262 · 110 Tórshavn

Fa / Bormann
Boring, Spreinging, grevstur.
Tlf. 225421

Til sølu

Grillvognur á keiini í Klaksvík til sølu, um nóg høgt boð fæst.

**Árni Müller**
**tlf. 265904**

Sethús í Havn

Eldri sethús, sum standa væl fyri miðskeiðis í Havn, til sølu um hóskandi boð fæst. Kunnu síggjast eftir avtalu.

**Tlf. 218896**

Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
Nú eisini úr Føroyskum gróti
Sosialurin - 311820





Skjót levering
Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið
Danstein Tel. 447512 Tel. 217512 Tel. 318323 Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Landsfundurin '02

verður í Havn 6. og 7. september

Føroya Javnaðarflokkur




TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Grunnurin

### til frama fyri samstarvi og fatan millum Aberdeen-Tórshavn

Nú verður møguleiki at søkja stuðul úr felagsgrunninum

Aberdeen-Tórshavn

sum býarstýrini í hesum býum hava sett pening í, og hvørs endamál er at veita fíggjarligan styrk til tiltøk ella annað, ið kann fremja og menna samstarvið og fatanina millum hesar kommunur og borgarar teirra.

Ætlanin er í september mánað at taka avgerð um veitan av studningi.

Tórshavnar býráð heitir tí við hesum á einstaklingar, feløg o.o., ið halda seg koma undir fyritreytirnar fyri stuðli, um at senda býráðnum skrivliga umsókn við frágreiðing um tiltakið ella starvsemið, nær tað verður framt og um mettan kostnað.

Meiri fæst at vita um treytirnar og uppsetan av umsóknini við at venda sær til Jens M. Poulsen, kommunustjóra, tlf. 31 51 60 ella 21 01 85.

Fyri at verða viðgjørd nú í september eigur umsókn merkt "Aberdeen-Tórshavn" at vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 2. september 2002.

SNARSKIVAN

## Útbjóðing

Í sambandi við bygging av eldrasambýli í Leirvík bjoðar Leirvíkar Kommuna hesi arbeiði út í almenna lisitatión.

**Sum høvuðsarbeiðstøka:**
Jørð-, kloakk-, betong- og timburarbeiði.

**Sum fakarbeiðstøkur:**
Múrara-, málara-, gólvleggingar-, hvs- og elarbeiði.

Útbjóðingartilfarið fæst við at gjalda kr. 2.000,- á konto 201.720.7 í Norðoya Sparikassa.

Tilboðini skulu sendast ella latast Leirvíkar Kommunu í afturlætnum brævbjálva, merktur:

Sambýlið við Ranggil

Innkomin tilboð verða latin upp á Kommunuskrivstovuni týsdagin 3. september 2002 kl. 11.00 og tá kunnu teir, sum bjóða, vera hjástaddir.

**Leirvíkar Kommuna**
Postrúm 42
520 Leirvík · Tlf. 443006 · Fax 443374


Sosialurin -har tað hendir


TK Stovan

## SKEIÐRØÐ UM ÚTFLUTNINGSTILBÚGVING

**Sept. 2002 - Mai 2003**
**Mánadag kl. 15.30 - 21.00 á Hotel Føroyum í Havn**

**Útflutningstilbúgving**
TK Stovan fer í heyst og vetur at skipa fyri einari skeiðrøð um útflutning. Endamálið við verkætlanini er at menna útflutningstilbúgvingina hjá nøkrum føroyskum virkjum. Luttakandi virkini skulu hava serligan áhuga í og vilja at menna sín útflutningsførleika.
Málbólkurin eru smá og miðalstór virkir, sum hava ætlanir um eina útflutningstilbúgving í virkinum. Ein útflutningstilbúgving kann fremjast við ymiskum endamáli, til dømis fyri at styrkja kappingarførið innan- og uttanlands, við at altjóðamenna virki, og/ella at styrkja marknaðargrundarlagið hjá virkinum.

Skeiðrøðin, sum TK Stovan skipar fyri, er roynd fleiri ferð við góðum úrslitum seinastu 4 árini av okkara samstarvsfeløgum í Danmark. Øll sløg av virkjum kunnu luttaka, bæði framleiðslu-, handils-, og tænastuvirkir.
Útflutningstilbúgvingin fevnir um eina røð av skeiðum, har dentur verður lagdur á at finna fram til útflutningsmøguleikar hjá virkjunum. Eisini eru møguleikar at skapa samband millum luttakandi virkini, sum kunnu hava felags trupulleikar og áhugamál.

**Hvat fær virkið burturúr**
Oljuvinnan (BP, Faroese Partnership, Agip og Statoil) hevur stuðlað verkætlanini við kr. 350.000. Tí koma luttakandi virkini bert at gjalda kr. 10.000 (uttan mvg) í part.

**Fyri peningin fær virkið:**
- 20 tímar beinleiðis ráðgeving og hjálp til uppgávur frá royndum útflutningsráðgeva
- beinleiðis hjálp at finna møguligar samstarvsfelagar á útvaldum marknaði
- beinleiðis ráðgeving frá TK Stovuni
- 7 undirvísingarskeið, har øll evnir innan útflutning verða viðgjørd. Skeiðini, sum tilsamans eru 30 tímar, verða skipað sum kvøldskeið við døgurða
- møguleiki at skifta orð og royndir við onnur útflutningssinnað virkir
- loypandi stuðul og vegleiðing frá serligum ráðgeva, sum er knýttur at verkætlanini
- undirvísingartilfar og mat og drekka

**Praktisk viðurskifti**
Útflutningstilbúgvingin byrjar í september 2002 og endar í maj 2003. Í hesum tíðarskeiðnum hittast luttakararnir 7 ferðir.
Verkætlanin tekur støði í teimum trupulleikum, sum virkini renna seg í, tá tey fara undir útflutning. Val av evnum verða tillagað til tørvin hjá luttakandi virkjunum.
Vit mæla til, at tveir luttakarar eru úr hvørjum virki. Tað kann t.d. vera eigarin av virkinum, ein útflutningsseljari, ella tann sum stendur fyri søluni á heimamarknaðinum.
Vit leggja dent á at góðir karmar eru um skeiðini, og at vit fáa góðan mat, kaffi og køkur. Alt er íroknað luttøkugjaldinum.

**Modulir við innihaldi**
Mánadag kl. 15.30-21.00

**Modul 1: 9. september 2002 - Inngangur – Hví útflutning**
**Modul 2: 14. oktober 2002 - Útflutningsstrategi**
**Modul 3: 11. november 2002 - Samstarvshættir og leiðsla**
**Modul 4: 9. desember 2002 - Flutningur og vørutillaging**
**Modul 5: 13. januar 2003 - Gjaldstreytir og fígging**
**Modul 6: 10. februar 2003 - Dømi við einum marknaði**
**Modul 7: 12. mai 2003 - Erfa bólkur**

**Tilmelding:**
TK Stovan, fax 31 93 63, tlf. 31 73 66 ella teldupost: tk@tk.fo
Tilmelding í seinasta lagi **mánadagin 19. august 2002.**
**Kostnaður:** kr. 10.000,00 u/mvg.

**Boða frá luttøku**
Er tykkara virki áhugað í at luttaka í hesari verkætlan, ella ynskja tit at fáa fleiri upplýsingar, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við TK Stovuna. Pláss er fyri 10 virkjum við tveimum luttakarum fyri hvørt virki. Um fleiri enn 10 virkir tekna seg tilskilar TK Stovan sær rætt til at velja millum tilmeldaðu virkini.

Virkisnavn: ____________ Tal av luttakarum: ____________

Navn/nøvn: ____________

Tel.: ____________ Fax: ____________

**TK Stovan**
Niels Finsens gøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Fax** +298 319363
tk@tk.fo
www.tk.fo

**VILJI VITAN VØKSTUR**
TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnilívinum og samstundis ein partur av tí umfevnandi danska TIC-kunningarsamstarvinum.